TELDUSÍÐAN

Rolluspæl við hinum grábeinta

Diablo er imponerandi og eitt sera vakurt rolluspæl við ljóðið og grafikki í høgum stíli

TEKSTMASKINAN

Diablo er ikki eitt ræðluspæl, sum tú eigur at verða bangin fyri, tá tú fyrstu ferð tekur musina í hendi og klikkir teg niður í undirheimin. Vist er tað eitt spæl, at drapsinstinktið má vera í lagi, men har greyturin í erva eisini skal nytast.

Ein góður blandingur av rollu og actionspæli í eini sera vakrari grafiskari útgávu og við góðum ljóðeffektum og vøkrum afturviðtónleiki.

Diablo er tað besta, sum vit leingi hava sæð innan rolluspølini

Labyrintur djevulsins

Umhvørvið er úr miðøld. Vit eru í eini oydnari landsbygd, har tey, ið eftir eru, hava nakrar óhugnaligar frásagnir. Undir leivdunum av einum gomlum kleystri húsast hin grábeinti sjálvur. Haðani fer hann undir endaliga álopið á jørðina og allar tess staklar. Stríðið móti tí ónda fer fram í einum djevilskum labyrinti av óhugnalium geingjum og korridorum, í oydum minum og við undirjarðiskar lavastreymar. Kring um liggja vápn, skjøl, gandakendir skattir og onnur ting, sum vit hava brúk fyri seinni.

Figgindarnir eru ein heldur lítið vøkur samling av demonum, skelettum, zombium, ódjórum við hornum og flúgvandi smádjevlar.

Einsamøll ella á Netinum

Talan er um eitt rolluspæl við trimum hetjusløgum. Tann djarvi krigsmaðurin, eitt snúðið beist og ta gløggga trøllið. Øll hava tey sínar serø eginleikar.

Tá tú hevur dripið eitt ávist tal av djevlum, lært tú fimm poeng, sum tú so kann býta millum tini evni og soleiðis sjálvur skapa tær ein karakter.

Tú kanst spæla Diablo einsamallur ella sama við upp til fýra øðrum annaðhvørt via modem, um eitt lokalt net ella gjøgnum Internetið við hjálp frá Battle.net, sum spæli hevur innbygt. Battle.net er ein nýggj tænasta, har tú við tveimum klikkum er úti í cyperspace.

Ein rúgva av spæli

Um tú so tekur dystin upp einsamallur ella saman við øðrum, so fer tú ikki at keða teg.

Diablo hevur ikki ber 16 ymisk støði. Hvørjaferð tú fert undir eitt nýtt spæl, generar maskinan eitt nýgg kort yvir ta undirjarðiska labyrintin við nýggjum tingum, nýggjum uppgávum og nýggjum demonum.

Grafikkurin er heldur ikki keðiligur. Hann er í SuperVGA og er nakað av tí mest realistiska, sum gjørligt er at fáa við hesum upploysinginum. Teir hava lagt stóran dent á smálutirnar.

Tú sært alt eitt sindur úr erva, og um hetjan stendur aftan fyri ein vegg, sært gjøgnum veggin, so tú alla tíðina sært, hvar tú ert og kanst verja teg.

Brúkaravinarligt

Ein onnur sterk síða er, at spælið er lætt at spæla. Ikki er nógvur tekstur, sum skal lesast, fyri at skilja meiningina, og brúkaraflatan er veruliga »smart«.

Í nógvum pop-up vindeygu niðast á skiggjanum liggur alt, sum skal brúkast.


Tú sært allatíðina um livið er í vanda og við einum klikki kanst tú finna fram váphið ella goymda gandaformularar ella siggja, hvør næsta uppgávan er. Ert tú við at verða slátraður av skoltum, er jú hentat fáa fatur á einum betri váphi - um eitt tílíkt er til staðar.

Fakta

Diablo er toppurin í sínum sjangru, bæði tí at grafikkurin er so realistiskur og brúkaraflatan so logisk og vinarlig og tí, at har eru tímar av undirhaldi goymt í labyrintunum, sum spælið goymir. Diablo er vert at vísa á.

Spælið krevur Windows 95, Pentium og 16 MB ram, um tú vilt spæla multiplayer - so bert 8 MB ram. Tað kann spælast á so at siga øllum sløgum av netverki við upp til fýra spælarum í senn.

Tað stendur einki um, hvørt forritið eisini fæst til Macintosh - men tað at vita um hjá Farodane…




Grafikkurin í spælinum Diablo eru sera realistiskur

Her eru góð ráð dýr. Her eru hermenn girdir í brøkur… Spæli Diablo kann spælast av tær sjálvum, men eisini saman við øðrum - og um Internetið



Á hesum myndum sæst tíverri ikki, hvussu góður grafikkurin í veruleikanum er, men niðast á skiggjanum eru sonevndar pop-up vindeygu, við data um, hvussu hetjurnar hava tað





Anti-Virus

McAfee - heimsins størsti framleiðari av antivirusforritum, hevur júst røttu og bestu forritini til at verja tygara dáta móti skaðiligum telduvirusum.

VIRUSSCAN™ - Finnur og burturbeinir kend og nýggj telduvirus á disklum, fløgum, harðdiskum og líknandi dátagoymslum. VirusScan fæst til DOS, Windows, OS/2, Machintosh og UNIX.

WEBSCAN™ - Kannar forrit og dáta, ið verða móttikin um internetið. WebScan virkar saman við NetScape, MS-Explorer og fleiri øðrum internet forritum.

NETSHIELD™ - Verður lagt á net-servaran og kannar øll dáta og forrit, ið verða goymd ella lisin á servaranum. NetShield fæst til Novell NetWare og Windows NT-server

WEBSHIELD™ - Ein sokallaður "Firewall", ið verjir Web-servaran móti telduvirusum

BOOTSHIELD™ - Verjir móti bootvirusum við at kanna bootsectorin tá teldan startar.

ROMSHIELD™ - Er ein bootprommur, ið verður settur á netkortið. RomShield kannar bootsectorin fyri telduvirus áðrenn styriskipanin verður innlisin.

McAFEE

690 Oyndarfjørður, tlf. 44872
fax. 44873, e-post: mcafee@olivant.fo